# Noreg bíðar eftir umsóknini




*Í norska dagblaðnum, Aftenposten, er í dag ein grein um at Føroyar ynskja at gerast limur í EFTA. Greinaskrivarin skrivar, at danir kunnu fara at seta føtur í spenni fyri føroyskum limaskapi*

*Tilgjørd mynd*

**Talskvinnan í norska uttanríkisráðnum, Anne Lene Dale Sandsten, vil einki siga um, hvørja støðu Noreg hevur til føroyskan limaskap í EFTA**

EFTA LIMASKAPUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

-Vit kunnu ikki taka støðu til nakað sum helst, áðrenn ein almenn umsókn úr Føroyum um limaskap í EFTA er klár. Ikki fyri enn umsóknin er latin EFTA, kunnu vit siga nakað nærmari um støðuna hjá Noreg um føroyskan limaskap.

Anne Lene Dale Sandsten er talskvinna í norska uttanríkisráðnum, og hon er rættiliga varin við at úttala seg um støðuna hjá Noregi í spurninginum um føroyskan limaskap í EFTA.

Spurd, um norska uttanríkisráðið hevur gjørt sær nakra meting av, hvørji framtíðarútlit Noreg sær við føroyskum limaskapi er svarið tað sama.

-Vit kunnu ikki siga nakað, áðrenn ein umsókn er latin EFTA, er stutta svarið.

Tíðindafólkið í Brússel hjá norska Aftenposten, Alf Ole Ask, hevur í dag eina søgu um, at Føroyar hava í hyggju at søkja um limaskap í EFTA. Í greinini framgongur , at møguligur føroyskur limaskapur í EFTA má metast út frá fólkarættarligum, handils- og uttanríkispolitiskum viðurskiftum.

Greinaskrivarin metir, at tey fólkarættarligu viðurskiftini mugu fyrst fremst vigast av dønum, og um teir vilja lata Føroyar gerast limur av EFTA.

### Formansskapin

Noreg hevur í løtuni formansskapin í EFTA. Formanskapurin í felagsskapinum gongur upp á skift millum tey fýra limalondini í EFTA. Á heimasíðuni hjá EFTA sæst at lesa, hvørjar raðfestingar Noreg hevur fyri EFTA í heyst.

Møguligur føroyskur limaskapur verður ikki nevndur sum partur av raðfestingunum í heyst.

Hinvegin leggur Noreg dent á at fáa fríhandilsavtaluna hjá EFTA við Suður Korea, sum kom upp á pláss 8. juli, undirskrivaða. Millum onnur mál kunnu nevnast, at EFTA ynskir at kanna møguleikan fyri eini fríhandilsavtalu við lond sum Algeria og Japan.




# Starvsfólk
## TIL PERLUNA Í SMS

### Fulla tíð

Søkt verður eftir fólki M/K til fulltíðarstarv - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara.

Vit gleða okkum at hoyra frá tær...



Send umsóknina til:
Perlan, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn
ella far inn á sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal

Perlan

## Hálvársroknskapurin 2005

*í 1.000 kr.*

| Rakstrarroknskapur 1. hálvár | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur o.a. | 147.487 | 147.643 |
| Rentuútreiðslur o.a. | 31.175 | 28.978 |
| **Rentuinntøkur netto** | **116.312** | **118.665** |
| Vinningsbýti av partabrøvum og øðrum kapitalpørtum | 431 | 329 |
| Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 10.076 | 8.572 |
| Útreiðslur til kostnað og provisiónir | 112 | 121 |
| **Rentu- og kostnaðarinntøkur netto** | **126.707** | **127.444** |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra | 15.396 | -4.109 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 378 | 267 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **142.481** | **123.602** |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 66.951 | 63.242 |
| Avskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | 3.865 | 2.725 |
| Tap og burturleggingar fyri skuldarar (netto) | 1.048 | 19.290 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 2.908 | 2.903 |
| **Úrslit av vanligum rakstri undan skatti** | **73.525** | **41.248** |
| Skattur | 14.705 | 8.257 |
| **Hálvársúrslit** | **58.820** | **32.991** |

| Fíggjarstøða pr. ultimo juni | | |
|---|---|---|
| **Ogn:** | | |
| Kassapeningur og áogn í lánistovnum o.a. | 470.448 | 268.669 |
| Útlán | 3.508.413 | 3.517.740 |
| Láns-, partabrøv o.a. | 1.818.395 | 1.468.778 |
| Kapitalpartar í leysknýttum og tilknýttum feløgum | 128.581 | 127.884 |
| Ítøkiligar ognir | 62.208 | 65.300 |
| Aðrar ognir og tíðaravmarkingar | 37.192 | 35.952 |
| **Ogn til samans** | **6.025.237** | **5.484.324** |
| **Skuld:** | | |
| Skuld til lánistovnar | 77.696 | 87.956 |
| Innlán | 4.266.050 | 3.802.796 |
| Onnur skuld og tíðaravmarkingar | 61.627 | 45.996 |
| Avsetingar til skyldur | 3.842 | 4.475 |
| Úrslit higartil í ár | 58.820 | 32.991 |
| Eginpeningur | 1.557.202 | 1.510.111 |
| **Skuld til samans** | **6.025.237** | **5.484.324** |
| Ábyrgdir | 144.298 | 143.989 |
| Aðrar skyldur | 0 | 30.000 |
| **Tøl, sum ikki eru tikin við í javnan, til samans** | **144.298** | **173.989** |

FØROYA BANKI